## Pierurin á Toftum gerast aftur

Bygdaráðið í Nes kommunu hevur samtykt at taka av einum tilboði frá Vest-Con at gera pierin inni í Oyrum aftur eftir ódnarveðrið. Tilboðið er uppá 150 til 200.000 krónur, alt eftir hvussu breiður pierurin verður. Tekniska nevnd mælti til at brúkast skulu 160.000 krónur til afturgerðina, umframt grótkeyp av Lambareiði, og hesum tók bygdaráðið somuleiðis undir við.



## Komnir inn at landa

Í dag er Grímur Kamban, sum samtrolar við Kallsevni komin inn at landa í Sørvági. Teir hava tilsamans um 200.000 pund, har meginparturin er upsi, skrivar heimasíðan joanisnielsen.fo. Grímur Kamban (myndin) landar til Landingarmiðstøðina í Sørvági, meðan Kallsevni landar á Sandi. Grímur Kamban og Kallsevni hava roynt í eina góða viku, og fara teir nýggjan túr í morgin.

# Vencil fjórði ognaður nýkomingum

**Nýggjasta útgávan av bókmentaritinum Vencil er ognað teimum, ið á onkran hátt royna seg sum rithøvundar fyri fyrstu ferð**

BÓKMENTIR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*




*Meðan nýggir høvundar sleppa at royna sín skriviførleika í Vencili fjórða, kann bókmentaritið eisini elva til lesiførleika sambært permutekstinum*

Nýggi Vencil er hin fjórði í røðini, og er hann ognaður nýkomingum. Summir av teimum gjørdust bæði kendir og heimskendir seinni, meðan aðrir kanska verða tað einaferð.

Millum føroysku høvundarnar, ið royna seg fyri fyrstu ferð, finna vit Duritu L. Jóansdóttir, Hans Olaf Joensen, Torfinn Jákupsson, Sissal Kampmann, Herluf Hansen, Anniku Skaalum, Annu Mortensen og Leif Olsen. Hesi hava skrivað yrkingar ritroyndir og stuttsøgur við.

**Heimskendir nýbyrjarar**

Hvør veit – kansa fjalir ein Strunge ella Hemingway seg millum føroysku høvundarnar, ið royna seg á fyrsta sinni. Til ber í øllum førum at samanbera við, hvussu tað hilnaðist hjá onkrum av teimum stóru høvundunum, tá eisini teir vóru nýkomingar. Týddu tekstirnir í Vencili hesuferð hava nevniliga eisini okkurt við hetta at debutera at gera.

Við er ein stuttsøga eftir Haruki Murakami, sum er úr fyrsta stuttsøgusavni hansara, sum kom út á enskum. Pauli Nielsen týddi.

Í Vencili fjórða ber nú eisni til á fyrsta sinni at lesa Naju Maria Aidt á føroyskum. Hon vann Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins 2008. Søgan er úr hennara fyrsta stuttsøgusavni, og tað er Arnbjørn Ólavsson Dalgarð, sum hevur týtt. Úlfur Hjörvar er eisini við í Vencili á hesum sinni. Tað er Carl Jóhan Jensen, sum hevur týtt hann. Eisini eru týðingar við eftir so mætar rithøvundar sum Ernest Hemingway, John Ashbery, Michael Strunge, Peter Adolphsen, Syndra Freysson og H.P. Lovecraft. Við øðrum orðum, so er Vencil fjórði ein góður blandingur av øllum tekstasløgum og fólki úr øllum heraðshornum.

Innihaldið fevnir víða. Alt frá eistrunum á veðraskjøldri løgmans, umvegis ein, ið finnur beinagrindina á Guði og til ein fíl, sum hvørvur í einum djóragarði.

**Lurta á www. vencil.fo**

Samstundis, sum Vencil fjóðri kemur út, eru nýggir upplestrar lagdir út á heimasíðuna hjá ritinum, www. vencil.fo. Millum annað lesur Hugin Eide stuttsøguna "Jodok letur heilsa", og eisini skipar Jónleif Johannesen egið kvæði úr Vencili triðja, ið nevnist "Deyðastund Sigmundar".

Sum nakað nýtt, ber nú eisini til at tekna seg til haldara beinleiðis á heimasíðuni.




*Roknibókin "Skygni 4" er á tremur við myndum og tekningum, sum gera tað lætt at síggja fyri sær, hvat tað er, sum skal roknast út*

# Nýggj roknibók til fjórða flokk

**Evni úr gerandisdegnum og náttúrini seta dám á nýggju roknibókina Skygni 4, ið er ætlað næmingum í fjórða flokki**

ROKNIBÓK

Nýggja roknibókin leggur upp til undirvísing, ið lagar seg til støðið hjá einstaka næminginum. Á teimum grønu síðunum eru lættar uppgávur, meðan tær á teimum bláu síðunum eru eitt sindur torføriri. Á reyðu síðunum eru uppgávurnar meir blandaðar.

Skygni 4 tekur ymisk evni upp í undirvísingina, har serliga nógv verður gjørt burturúr geradisdegnum og náttúruviðurskiftum. Annars er bókin skipað í fimm ymisk tema – hæddir, keyp, prísir, rómartøl, Føroyar og Ferðslu - sum við mátingum, útrokningum og royndum vísa støddfrøðina í nýtslu.

Eisini er bókin á tremur við myndum og tekningum, sum gera tað lætt at síggja fyri sær, hvat tað er, sum skal roknast út.

Tað er Føroya Skúlabókagrunnur, sum gevur Skygni 4 út.

ave